Dagf. 18. juni 2024
HMR j. nr. 24/14760-4

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-127/2023 eftir § 52 a í tingskipanini um sjúklingar sendir til Aalborg at skannast heldur enn til Klaksvíkar, frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Kundu teir 28 sjúklingarnir, sum Landssjúkjahúsið nýliga hevur ávíst til Aalborg at skannast, ístaðin verið sendir til Klaksvíkar?

2. Hvat er meirkostnaðurin av at senda hesar 28 sjúklingarnar til Danmarkar í mun til, at teir blivu sendir til Klaksvíkar sjúkrahús?

Svar:

Til spurning 1

Nei, sum nú er letur hetta seg ikki gera. Sambært Sjúkrahúsverkinum eru fylgjandi orsøkir til tess:

Ein 3T MR-skannari hevur framkomna tøkni, sum Sjúkrahúsverkið ikki áður hevur havt. Sostatt er neyðugt at tryggja, at radiografarnir í MR-toyminum fáa upplæring og royndir, og tað verður m.a. gjørt við at gera kanningar, av so sum heila, liðum og ryggi. Hetta eru kanningar, sum frammanundan verða gjørdar í Sjúkrahúsverkinum í einum 1,5T MR-skannara.

Prostata kanning er kompleks á ymiskan hátt, sum umframt upplæring og royndir eisini krevur førleikamenning av starvsfólki og avtalu við røntgendeild uttanlands, sum m.a. kann tulka tílíkar myndir. Sambært tíðarætlanini hjá Sjúkrahúsverkinum fyri íverksetanina av MR-toyminum og 3T

MR skannaranum, sum var klár í byrjanini av 2024, verða hesi viðurskifti komin uppá pláss og klárt er at gera prostata kanningar í september ella oktober í ár.

Til spurning 2

Sum nevnt omanfyri er enn ikki møguligt at skanna teir 28 sjúklingarnar í Føroyum. Tí eru tølini niðanfyri sett upp út frá tí fyritreyt, at tað var møguligt at skanna sjúklingarnar í Føroyum.

Tann metti meirkostnaðurin av at senda 28 sjúklingar uttanlands (um tað bar til at skanna fyri prostata á Klaksvíkar sjúkrahúsi) er hesin:

Kostnaðurin fyri 28 sjúklingar til Danmarkar (Aalborg) er:	Kr. 229.908
Kostnaðurin fyri 28 sjúklingar til Klaksvíkar er:	Kr. 70.308
Munur:	Kr. 159.600

Tølini byggja á útrokningarnar frá Kliniska Stápi – Uttanlandstænastuni í Sjúkrahúsverkinum:

					Kostnaður pr. viðgerð	Árligur kostnaður
ÁR	**Viðgerð**	**Tal av sjúkl.**			**v/fylgjara**	**v/ fylgjara**
2024	MR skanning	28	Viðgerð (DRG prísur)*		2.511	70308
			Flogferð	sjúklingur	4.200	117600
			Flutningur annars		1.000	28000
			Uppihald	sjúklingur	500	14000
					8.211	**229.908**

* DRG stendur fyri “Diagnosis Related Group”. DRG-prísir verða vanliga nýttir til at seta prís á ymiskar veitingar í sjúkrahúsverkinum.

Talvan omanfyri vísir kostnaðin av at senda sjúklingar til MR-skanning í Aalborg. Hvør skanning kostar sambært hesum umleið 8.211 kr., íroknað ferðing og uppihald har gist verður eina nátt á sjúklingahotelli í Aalborg.

Um 28 sjúklingar verða ávístir til MR-skanning í Aalborg verður kostnaðurin sostatt góðar 230 tús. kr., við omanfyrinevndu fortreytum.

Undir vanligum umstøðum hevur sjúklingurin ikki fylgjara við, tá ið ávíst verður til MR-skanning í Danmark. Fyrivarni skal takast fyri, at tað í einstøkum førum er neyðugt á ávísa fylgjara við. Tá skulu ferða- og uppihaldsútreiðslur leggjast afturat omanfyrinevnda kostnað.

Kostnaður í Føroyum, um kostnaðurin svarar til DRG-prís:

Viðgerð	Tal av sjúkl.		Kostnaður pr. viðgerð (DKK)	Kostnaður fyri 28 sjúklingar (DKK)
MR scanning	28	Viðgerð (DRG-prísur)	2.511	70308

Prísurin á eini MR-skanning av prostata í Føroyum kann gerst dýrari enn ásetti DRG-prísurin, eftirsum talið av skanningum er lágt, og tað vanliga gerst dýrari at tryggja førleikar v.m. í einum lítlum sjúkrahúsverki.

Heilsumálaráðið, 18. juni 2024

Margit Stóra
landsstýriskvinna